# FREM SÁLARLIGU HEILSUNA Í FØROYUM

## RÁÐSTEVNA UM ABC FYRI SÁLARLIGA HEILSU




**FRÍGGJADAGIN 20. MAI 2022**
**KL.10.00-14.15**

í Smæruni, J. H. Schrøtersgøta 7, Tórshavn

Fólkaheilsuráðið

# SKRÁ

| | |
|---|---|
| **KL.10.00-10.10** | Vælkomin |
| **KL.10.10-10.20** | Magni Mohr, formaður í Fólkaheilsuráðnum<br>*Bjóðar vælkomin* |
| **KL.10.20-11.00** | Line Nielsen og Charlotte Meilstrup, Københavns Universitet<br>*ABC fyri sálarliga heilsu - hví og hvussu? Royndir úr Danmark* |
| **KL.11.00-11.05** | ABC steðg |
| **KL.11.05-11.25** | Monika Mohr, Fólkaheilsuráðið<br>*ABC fyri sálarliga heilsu í Føroyum* |
| **KL.11.25-11.40** | Vár Honnudóttir, Fólkaheilsuráðið<br>*ABC úrslit úr "Hvussu hevur tú tað? 2019"* |

**MELDA TIL RÁÐSTEVNU HER:**

ABC FYRI SÁLARLIGA HEILSU

Ver virkin Ver saman Ver hugbundin

Fólkaheilsuráðið

# SKRÁ

| | |
|---|---|
| **KL.11.40-12.00** | Ziggi Ivan Santini, Statens Institut for Folkesundhed<br>*Týdningurin av at fremja sálarliga vælveru í heilsu- og fyribyrgingarstrategium* |
| **KL.12.00-12.30** | Miðmáli |
| **KL.12.30-12.45** | Katrin Dam á Neystabø og Andras Nolsøe, ÍSF<br>*Í vælrikna felagsskapinum rúmast ABC í øllum liðum* |
| **KL.12.45-13.10** | Hanna Christensen, DGI<br>*"Frá tanka til handling"* |
| **KL.13.10-13.15** | ABC steðg |

**MELDA TIL RÁÐSTEVNU HER**

ABC FYRI SÁLARLIGA HEILSU
Ver virkin Ver saman Ver hugbundin

Fólkaheilsuráðið

# SKRÁ

| | |
|---|---|
| **KL.13.15-13.30** | Magnus Pauli West, Vágs kommuna<br>*Vágs kommuna og arbeiðið við heilsufremjan* |
| **KL.13.30-13.55** | Lisbeth Holm Olsen, Center for Forebyggelse i Praksis, KL<br>*ABC fyri sálarliga heilsu - dømi frá kommunalum praksis* |
| **KL.13.55-14.10** | Annika Helgadóttir Davidsen og Monika Mohr, Fólkaheilsuráðið<br>*Nýggj kanning um ung og sálarliga heilsu í Føroyum* |
| **KL.14.10-14.15** | Takk fyri í dag |

**MELDA TIL RÁÐSTEVNU HER**

ABC FYRI SÁLARLIGA HEILSU

Ver virkin Ver saman Ver hugbundin

Fólkaheilsuráðið

# FYRILESTRAHALDARAR

**Annika Helgadóttir Davidsen** hevur eina ph.d í sálarfrøði og starvast sum adjunktur á Deildini fyri Heilsu- og Sjúkrarøktarvísindi á Setrinum. Annika hevur seinastu árini m.a. granskað í sálarheilsuni hjá ungum og er í løtuni í gongd við eina størri kanning av arbeiðsumhvørvinum hjá føroyskum arbeiðstakarum. Annika hevur seinastu tíðina saman við Fólkaheilsuráðnum kannað sálarligu heilsustøðuna hjá ungum í Føroyum.

**Charlotte Meilstrup** er cand.scient.san.publ., ph.d. og verkætlanarstjóri fyri ABC fyri sálarliga heilsu í Danmark. Charlotte starvast sum post.doc á Institut for Psykologi, á Københavns Universitet og granskar í sálarligari heilsufremjan við denti á allar íbúgvar. Hon hevur serligan áhuga fyri sálarligari heilsu millum børn og ung, sosiala ójavnvág í heilsu og interventiónsgransking og hvussu samstørv tvørtur um deildir í tí almenna og tvørfakligar samstarvsfelagar riggar. Charlotte er serliga ágrýtin at umseta gransking til praksis og hevur fleiri ára royndir við at leiða, menna og seta í verk og eftirmeta átøk fyri at skapa betri sálarliga heilsu.

**Hanna Christensen** er verkætlanarleiðari í DGI (Ítróttarorganisatión við denti á breiddarítrótt). Hanna er kandidatur í ítrótti frá Københavns Universitet, og hevur starvast í DGI síðani 2015. Síðani 2016 hevur Hanna arbeitt við ABC fyri sálarligari heilsu sum háttalag til at skapa sálarliga heilsufremjandi karmar í ítróttafelagsskapum.

**Katrin Dam á Neystabø og Andras Nolsøe** eru ítróttarráðgevar í ÍSF. Somuleiðis eru bæði Katrin og Andras ABC samskiparar í ÍSF. Katrin ráðgevur um breidd og rørslusamstørv og Andras er ráðgevi hjá sambondum og ítróttfeløgum.

# FYRILESTRAHALDARAR

**Line Nielsen** er cand.scient.soc., ph.d. og postdoc á Institut for Psykologi, á Københavns Universitet. Line er verkætlanarleiðari fyri einum trivnaðarátaki fyri lesandi á SAMF, KU. Sálarlig heilsufremjan er eitt sterkt og gjøgnumgangandi evni í granskingini hjá Line, sum eisini snýr seg um sálarliga heilsu millum børn, ung, sosialan ójavnvág í sálarligari heilsu og interventiónir. Arbeiðið hjá Line er merkt av samstarvi við praktikarar og granskarar tvørtur um ymiskar deildir í tí almenna og vísindagreinir og hon brennir fyri at fáa vitan, ið er grundað á gransking, umsetta til konkret átøk, ið kunnu gera ein mun og fremja sálarliga heilsu.

**Lisbeth Holm Olsen** er høvuðsráðgevi í Center for Forebyggelse i Praksis, í Kommunernes Landsforening. Center for Forebyggelse i Praksis stuðlar kommunum við at uppbyggja kapasitet fyri at styrkja sálarliga heilsu við støði í ABC fyri sálarliga heilsu. Lisbeth arbeiðir við at stuðla menning av politikkum og seta í verk heilsufremjandi (herundir sálarliga heilsufremjandi) og fyribyrgjandi átøk í kommunum, ið eru grundað á gransking. Lisbeth hevur í nógv ár starvast við heilsu tvørtur um deildir í tí almenna og er t.d. partur av samstarvinum ABC fyri sálarliga heilsu í Danmark og “alliance mod sosical ulighed i sundhed”. Lisbeth er kandidat í samfelagsvísindi, søgu og samskifti og hevur eina leiðsluútbúgving.

**Magni Mohr** er formaður í Fólkaheilsuráðnum.

**Magnus Pauli West** er leiðari í Miðlatúni, sum er stovnur undir Vágs Kommunu. Magnus er ABC samskipari í kommununi. Magnus hevur eina kandidat í kultur, kommunikation og globalisation við sergrein í leiðslu.

# FYRILESTRAHALDARAR

**Monika Mohr** er cand. mag. í sálarfrøði og heilsufremjan og heilsustrategium og arbeiðir í Fólkaheilsuráðnum. Monika hevur staðið á odda fyri verkætlanini ABC fyri sálarliga heilsu hjá Fólkaheilsuráðnum seinastu fimm árini og hevur uppbygt eitt stórt og vælvirkandi netverk av samstarvsfeløgum runt um í øllum landinum. ABC verkætlanin er eitt dømi um íverksetan av sálarligari heilsufremjan á tjóðarstøði. Monika og Annika Helgadóttir Davidsen hava seinastu tíðina gjørt eina kanning um ung og sálarliga heilsu í Føroyum.

**Vár Honnudóttir** er kandidat í Fólkaheilsufrøði (cand.scient.san.publ) frá Københavns Universitet. Vár hevur starvast við ymiskum verkætlanum hjá Fólkaheilsuráðnum síðani 2016 og hevur staðið fyri stóru kanningini hjá Fólkaheilsuráðnum "Hvussu hevur tú tað? 2019". Vár starvast nú sum verkætlanarfólk í Fólkaheilsuráðnum.

**Ziggi Ivan Santini** er granskari, epidemiolog, ph.d, og MPH. Ziggi hevur eina altjóða doktorgrad í psykiatrisk epidemiologi og sosialar relatiónir frá Universitat de Barcelona, har hann hevur verið við í tí einasta Marie Curie programminum, ið bert fevnir um sálarliga heilsu. Ziggi hevur verið granskari á Statens Institut for Folkesundhed síðan 2017 og hevur havt ábyrgdina fyri gransking í ABC fyri sálarliga heilsu í Danmark.